
Hvar liggur Grønhøvdi?

Føroyingar hava í mong harrans ár kravt og biðið um, at føroyskir staðanavnaformar og -stavimátar verða respekteraðir. Men nú eru teir so sjálvir farnir at spæla sær við at brongla og uppfinna nøvn víða hvar í Verðini, skrivar Rolf Guttesen í hesum Sjónarmiði.



So langt eg kann minnast, hava føroyingar gramt seg um, at summi staðanøvn á Føroyakortinum, sum Geodætisk Institut (nú eitur tað Kort- og matrikelstyrelsen) í Keypmannahavn gav út, høvdu danskan form ella vóru stavað á donskum, sum summi søgdu.

Nú hava kortini tey topografisku kortini 1:20.000 sum, Kort- og Matrikelstyrelsen er farin undir, bert tey føroysku staðanøvnini. Teir hava lurtað eftir føroyskum ráðum, og givið staðanøvnunum tann form og stavimáta, sum verður brúktur í Føroyum.

Hetta er eisini tað princip, sum vinnur fram millum geografar, kartografar og forløg, sum geva út kort og atlass. Tað sær man í t.d. donskum, svenskum, eingilskum, amerikanskum atlassum. Tó er íslendingar enn herviligir at avbrongla staðanøvn um allan heim.

Vanligt er at skilja millum tveir formar, tá tað snýr seg sum staðanøvn í øðrum londum. *Geografisk staðanøvn* stavast og hava tann formin, sum íbúgvarnir í landinum brúka. Í Danmark eitur høvuðsstaðurin København. Hin formurin eru tey sokallaðu *konventionellu staðanøvnini*. Føroyingar siga sum oftast (konventionelt) Keypmannahavn um sama bý, tí hann hevur verið kendur og vitjaður av føroyingum í fleiri hundrað ár. Harumframt er tann upprunaligi danski formurin, Kjøbmannehavn, varðveittur í tí føroyska stavimátanum.

Á sama hátt eru teir upprunaligu gomlu formarnir í nógvum føroyskum staðanøvnum varðveittir í tí danska forminum, sum nú er útruddaður av kortunum. Hósvík kemur av pórsvík, og stavaðist í danska forminum Thorsvig, sum líkist tí upprunaliga forminum nógv meira enn tann nútíðar føroyski.

Áðrenn »støtið« kom inn í føroyskt, úttalaðust Gjógv og Sjógv soleiðis, sum tey skrivaðust á donskum: Gjov og Sjov. Tann gamli, upprunaligi formurin er varðveittur í danska skrivimátanum.

Lond, sum í øldir hava siglt um høvini og hava átt hjálond, eitt nú Holland, England, Frankaríki, Spania og Portugal, hava eisini av somu grund nógv konventionel staðanøvn í teirra máli. Føroyingar hava av góðum grundum bert heilt fá. Flest eru landanøvn og so Keypmannahavn.

Mangt bendir nú á, at føroyingar, sum nú eru farnir at útgeva kort, atlass og leksikon, hava valt ta íslendsku leiðina. Tó, ikki eru tað »føroyingar«, men ein nevnd á Debesartrøð, sum uppfinnur og dikterar, hvat ið er rætt og skeivt. Og tað vísir seg sum bæði blaðfólk og forløg ikki tora annað enn at brúka hesi nýggju uppfinnilsini.

Tað vísir seg m.a. á einum nýggjum korti, sum vísir havøkið rundan um Føroyar, útgivið av Føroya Skúlabókagrunni í 1992. Johnny Thomsen hevur longu í Sosialinum herfyri vist á hvat galið er. Nøvn á bankum, ryggjum og dýpum, sum hava verið brúkt av fiskimonnum í meira enn 100 ár, og sum standa á øllum sjókortum, tey skulu blakast burtur, og nýggj uppfinnilsir skulu setast í staðin.

Tað vísir seg eisini í eini uppslagsbók (barnaleksikon), sum tey kalla Alfrøði. Eg trúði í mínari fávitsku, at bert Ein var alvitandi, alvaldandi, alfróður. Men eftir sum íslendska orðabókin hevur »alfræðiorðabók = leksikon«, so mundi valið hjá uppfinnarunum vera lætt. Staðanøvn í allari Verðini skulu nú stavast á føroyskum, summi enntá umsetast ella bronglast til føroyskt, so at bert (summir) føroyingar skilja. Tað vakra landið Chile í Suðuramerka, har spanskt er høvuðs- og umsitingarmál, skal nú á føroyskum stavast Kili. Saman við Tjekkoslovakínum. Tað skal stavast Kekkoslovakíið. Ljótt, óhóskandi og ópraktiskt. Hví so ikki stava Tjørnuvík soleiðis: Kjødnuvík? (Tað gjørdi Svabo á sinni).

Sjónarmið

Verri er, at hetta hermaralyndið hevur gjøgnumtrumfað, at summi staðanøvn í fremmandum londum verða umsett. Cabo Verde í Vesturafrika skal nú eita Grønhøvdi. Hetta er bert eitt dømi. Rætt er, at verða á sponskum og portugisiskum merkir grønt, og cabo kemur av tí latínska caput, sum merkir høvd. Men hví umseta fremmand staðanøvn við cabo, cape ella kap?

Øll staðanøvn hava ein serligan týdning, og kundu í prinsippinum verið umsett. Hevði tað verið gjørt, so var ein bábilskur forvirringur í Verðini.

Einasta princippið, sum eg dugi at síggja í »føroysku« royndunum, er tað, at soleiðis gera íslendingar. Til dømis í Landabréfabók 2, útgivin í Reykjavík 1979, sum hevur »høvdar« um allan heimin. Tó, eisini teir eru inkonsekventir, tí á Australiakortinum eita nakrir »høvdar« Cape Howe, Cape Arnhem, Cape Leeuwin osfr., og Nordkapp kalla teir heldur ikki Norðurhøvda. Og í aðrar mátar er nevnda Landabréfabók ikki so grov sum føroysku hermararnir. Kili stavast her Chile, og Kekkoslovakia eitur Tékkoslovakia.

Føroyingar hava í mong harrans ár kravt og biðið um, at føroyskir staðanavnaformar og -stavimátar verða respekteraðir. Men nú eru teir so sjálvir farnir at spæla sær við at brongla og uppfinna nøvn víða hvar í Verðini.

Ger móti øðrum, soleiðis sum tú vilt, at tey skulu gera móti tær!

19. jan. 1993

Rolf Guttesen
Geografisk Institut
Keypmannahavn

Amerikanskur heilsustovnur játtað pengar:

Føroysk børn kannast fyri kviksilvureitran

Mánadagin klokkan 16 verður fundur í Veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum um eitrandi árin á nervalagið hjá føroyksum børnum. Ein amerikanskur heilsustovnur hevur játtað pengar til kanningina.

Í tíðarskeiðnum mars 1986 til desember 1987 vórðu flest allar konur, ið komu á sjúkrahúsini at eiga, bjóðaðar at luttaka í einari granskingarætlan, sum hevur til endamáls at kanna um samband er millum ta kviksilvurnøgd sum føroysk børn verða fødd við og heilabúningina fyrstu árini. Luttøkan var stór og vit fingu kannað blóð úr nalvastrongjunum og samstundis kannað hár frá mammunum í 1023 førum. Kanningarúrslitið sýndi, at miðalkvikksilvurnøgdin hjá føroyskum børnum er munandi hægri enn hjá børnum í grannalondum okkara. Orsøkin er fyrst og fremst kviksilvurinnihaldið í grind.

Tá børnini vóru ársgomul var kviksilvurnøgdin í hári aftur kannað og samstundis gjørdu heilsusystrarnar í Føroyum eina meting av heilsustøðu og búning. Hetta varð tó bert gjørt í økjum har heilsusystur virkaði. Kanningin av teimum ársgomlu gav onga ábending um at samband er millum kviksilvurnøgd og búningarstig.

Fyri at koma til eina meira álitandi niðurstøðu varð ætlanin at kanna børnini betur um 3 ára aldur, men hetta varð av ongum, tí peningur ikki varð tøkur.

Í oktober 1992 fingu vit játtað neyðugan pening frá heilsumyndugleikum í USA (National Institut of Health) soleiðis, at tað ístaðin verður gjørligt at kanna børnini um 7 ára aldur. Ætlanin er at kanna aðra helvtina av børnum í apríl, mai og juni 1993 og hina um somu tíð í 1994.

Talan er um eina nágreiniliga heilsukanning, serliga av nervalagnum. Eftir ætlan verður kanningin av hvørjum barni at vara í 4 timar og er í trimum høvuðspørtum:

1. Barnalæknakanning sum verður framd av Nicolinu Sørensen, lækna og Karl Wulff barnalækna.
2. Neurofysiologiskar kanningar, sum Dr. Morato og Dr. Yokojama frá universitetinum í Tokyo gera.
3. Neuropsykologiskar kanningar, sum Fróði Debes, sálarfrøðingur ger.

Nógv orka hevur verið løgd í at finna høskandi psykologiskar royndir. Í hesum arbeiði hava serliga 3 amerikanskir neuropsykologar verið okkum hollir í ráðum. Teir eru Dr. Rick Letz, Division of Environmental and Occupational Health, Emory University School of Public Health í Atlanta og Dr. David Otto, University of North Carolina og Dr. Roberta White, Department of Clinical Neuropsychology, Veterans' Medical Center, Boston.

Í samband við endaligu fyrireikingarnar av psykologiska partinum av kanningini hava vit bjóðað teimum trimum til fundar í Havn.

Við tað at her er talan um køn fólk innan sálarfrøði og neurotoxikologi, fara vit at nýta høvi at bjóða áhugaðum fakfólki til fundar um møguligt eitrandi árin á nervalagið hjá føroyskum børnum. Philippe Grandjean, professari og Fróði Debes psykologur vera eisini við á fundinum.

Á fundinum verður eisini greitt frá granskingarætlanini sum heild.

Pal Weihe,
yvirlækni